# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800



Tað endaði við javnleiki, tá AB og 07 Vestur spældu á Argjum fyrr í ár. Hesa ferð hevur 07 Vestur illa ráð til annað enn ein sigur, um teir ikki skulu søkka alt ov langt frá lívbjargandi áttanda plássinum

# Perfekt timing

**Skráin hjá FSF kundi mest sum ikki verið løgd neyvari. Nú seinasta umfarið fyri summarsteðgin stendur á skránni, er talan um satt brak í øllum fimm dystunum. Tríggir teirra verða spældir í kvøld**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Bæði í Klaksvík og í Sørvági er talan um dystir, har heimaliðið væl og virðiliga hevur knívin á barkanum ,men har møguleikin samstundis er at flyta knívseggina nakrar millimetrar útfrá.

KÍ vann fyri fyrstu ferð í ár, tá teir vitjaðu á Argjum sunnudagin. Eingin sum helst ivi er um, at sigurin hevur gjørt mest sum undurverk fyri sjálvsálitið hjá illa sperdu klaksvíkingunum, og kunnu teir brúka hetta positivt í kvøld, kann ÍF væl standa fyri eini heilt truplari uppgávu.

Fuglfirðingar sjálvir spældu væl á Toftum, men teir fingu einki stig við sær, og tí kann niðurflytingarstrikan koma heilt nær, um teir einki fáa við sær úr Klaksvík.

Og í Sørvági er støðan á leið tann sama. 07 Vestur hevur fleiri ferðir verið sera nær við, men alt ov ofta – seinast leygardagin – hava teir mist stig á stokkinum, og tí eru teir nú niðastir í deildini. AB tykist hinvegin vera steðgað fullkomuliga upp, og tí kunnu vágamenn við einum sigri í hesum dystinum veruliga trýsta tey, sum eru beint omanfyri strikuna. Teirra millum er altso AB, sum annars tóktist hava vunnið sær mest sum tryggleika fyrstu 10 umførini, men tann støðan er altso broytt heilt mundandi.

Seinasti dysturin í kvøld er við Margáir, har EB/Streymur skal royna at byggja víðari á góða úrslitið, sum teir fingu við Løkin í Runavík. Mótstøðan hesa ferð er Víkingur, sum saman við EB/Streymi er eitt av liðunum, sum stríðist um heiðursmerki.

Skal EB/Streymur veruliga leggja seg í hesa kappingina, er alneyðugt við einum sigri nú, meðan Víkingur hinvegin kann leggja eyka trýst á HB, B68 og NSÍ, sum øll spæla í annaðkvøld.

## Dystaryvirlit

**Vodafone-deildin**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 24.06 | KÍ-ÍF | Petur Reinert |
| 24.06 | 07 Vestur-AB | Dagfinn Olsen |
| 24.06 | EB/S-Víkingur | Ransin N. Djurhuus |
| 25.06 | HB-B36 | Eiler Rasmussen |
| 25.06 | B68-NSÍ | Georg N. Rasmussen |

vodafone deildin

**Vodafone-deildin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 13 | 10 | - | 2 | - | 1 | 37 | 20 | 17 | 32 |
| 2 Víkingur | 13 | 7 | - | 3 | - | 3 | 28 | 18 | 10 | 24 |
| 3 B68 | 13 | 7 | - | 3 | - | 3 | 26 | 21 | 5 | 24 |
| 4 NSÍ | 13 | 7 | - | 2 | - | 4 | 29 | 22 | 7 | 23 |
| 5 EB/S | 13 | 5 | - | 4 | - | 4 | 24 | 19 | 5 | 19 |
| 6 B36 | 13 | 4 | - | 4 | - | 5 | 18 | 23 | -5 | 16 |
| 7 AB | 13 | 4 | - | 2 | - | 7 | 12 | 21 | -9 | 14 |
| 8 ÍF | 13 | 3 | - | 3 | - | 7 | 15 | 20 | -5 | 12 |
| 9 KÍ | 13 | 1 | - | 5 | - | 7 | 12 | 22 | -10 | 8 |
| 10 07 Vestur | 13 | 1 | - | 4 | - | 8 | 21 | 36 | -15 | 7 |

**Formbarometrið**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 6 | 5 | - | 1 | - | 0 | 21 | 13 | 8 | 16 |
| 2 B68 | 6 | 5 | - | 1 | - | 0 | 15 | 7 | 8 | 16 |
| 3 Víkingur | 6 | 4 | - | 1 | - | 1 | 12 | 6 | 6 | 13 |
| 4 NSÍ | 6 | 3 | - | 0 | - | 3 | 12 | 10 | 2 | 9 |
| 5 EB/S | 6 | 2 | - | 2 | - | 2 | 13 | 12 | 1 | 8 |
| 6 AB | 6 | 2 | - | 0 | - | 4 | 4 | 10 | -6 | 6 |
| 7 ÍF | 6 | 1 | - | 2 | - | 3 | 8 | 8 | 0 | 5 |
| 8 KÍ | 6 | 1 | - | 2 | - | 3 | 7 | 12 | -5 | 5 |
| 9 B36 | 6 | 1 | - | 2 | - | 3 | 6 | 11 | -5 | 5 |
| 10 07 Vestur | 6 | 0 | - | 1 | - | 5 | 8 | 17 | -9 | 1 |